# Nýtt brævlán frá Landsstýrinum

**Enn er eingin føroyskur virðisbrævamarknaður komin, so Landsstýrið hevur valt at geva brævlán út fyri eitt ár í senn til marknaðurin verður veruleiki**

BRÆVLÀN
*Heri á Rógvi*



*Sigurd Poulsen, stjóri fyri Landsbankan, sigur, at virðisbrævamarknaðurin kann vera klárur komandi ár*

Føroya Landsstýri gevur út nýtt 3,25% brævlán áljóðandi 300 mió kr 11. desember 2002. Lánið skal nýtast til endurfígging af verandi brævláni, sum fellur til gjaldingar sama dag.

Landsbanki Føroya og Nordea Bank skipa fyri lánínum. Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag p/f og Norðoya Sparikassi eru med-fyriskiparar.

Nýggja lánsbrævið, sum verður skrásett í Værdipapircentralen og noterað á Københavns Fondsbørs, fellur til gjaldingar 11. desember 2003.

Hesum boðar Landsbanki Føroya frá í tíðindaskrivi.

Sigurd Poulsen, stjóri fyri Landsbanka Føroya, sigur, at rentan er umleið tað sama sum á tilsvarandi brævlánum hjá statinum. Ein lítið rentumarginalur er lagdur afturat.

Skatturin av rentuvinninginum fyri brævlán er 35% fyri privat persónar. Fyri partafeløg skal gjaldast vanligur partafelagsskattur.

At keypa eitt tílíkt brævlán kemur ikki nógv meira – onkustaðni minni – ein uppsparingar konto í banka ella sparikassa.

Sigurd Poulsen sigur, at hjá Landsbankanum eru teir ikki kunnaðir um, hvør tað er, sum keypir partar av tílíkum brævlán. Hann sigur tó, at teir størru bitarnar oftani enda hjá útlendskum ánarum.

Orsøkin til, at brævlánið er sett til eitt ár, er, at Landsstýrið ynskir at bíða til ein føroyskur virðisbrævamarknaður kemur á beinini.

– Til hesin verður veruleikin, hevur Landsstýrið valt at útgeva brævlánini fyri eitt ár í senn, sigur Sigurd Poulsen.

Stjórin fyri Landsbankan veit eisini at siga, at teknískt og fíggjarliga er klárt at byrja við virðisbrævamarknaðinum í 2003. Enn er tó nøkur ting, sum skulu fella upp á pláss, áðrenn byrjast kann. Politiskur vilji skal eisini vera til staðar.

Sigurd Poulsen roknar fyri vist, at byrjanin hjá marknaðinum verður spakulig fyri allar partar.

Eftir orðaskiftinum í Løgtinginum at døma, kann ein komandi virðisbrævamarknaður fáa stóra ávirkan. Tosað verður í løtuni um, at landsins ognir í form av Fiskavirking og øðrum almennum fyritøkum skulu seljast um ein føroyskan virðisbrævamarknað.

# SvF bjargað komandi árini

**– Kom hendan hækkingin ikki, vórðu vit noydd at gera umfatandi uppsagnir, sigur Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri, nú Annlis Bjarkhamar hevur kunngjørt, at hyggjaragjaldið til Sjónvarp Føroya hækkar við 500 krónum komandi ár**

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*



*Hækkanin í hyggjaragjaldinum fer at geva Sjónvarpi Føroya meiri rúm at virka í næstu árini, metir sjónvarpsstjórin. Kom hækkanin ikki var allarhelst neyðugt við uppsagnum*

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Annlis Bjarkhamar, hevur avgjørt, at hyggjaragjaldið fyri SvF skal hækka við 500 kr. komandi ár. Hetta merkir ein reellan vøkstur til Sjónvarp Føroya upp á 400 kr. fyri hvørt føroyskt húski. Tann síðsti hundraðkrónuseðilin fer aftur í landskassan í meirvirðisgjaldi.

– Øll eru greið yvir, at Sjónvarpið tørvar meira pening. Hetta er so loysnin, mann hevur valt, fyri at fáa hendan pening til vega, sigur Annlis Bjarkhamar.

Hon leggur afturat, at málið hevur verið til drúgva viðgerð í samgonguni, og semja er um, at hetta er tað rætta stigið at taka.

Vit royndu til fánýtis at fáa viðmerkingar frá Fólkaflokkinum til hetta uppskotið.

Áhuga var hvørki fyri at flyta raksturin á fíggjarlógina ella fyri ætlaða kringsvarpsskattinum, ið Annlis Bjarkhamar var fortalari fyri.

Nú verður so hyggjaragjaldið hækka, og harvið verður tað.

Annlis Bjarkhamar sigur, at hon roknar við, at hetta vil geva Sjónvarpi Føroya 5,8 mió. í meirinntøka komandi árið.

Lurtaragjaldið fyri Útvarp Føroya verður tó ikki broytt. Annlis Bjarkhamar grundar hetta á, at Sjónvarp Føroya er í einari so trongari støðu, at alneyðugt er við atgerðum fyri at halda lív í stovninum. Raksturin hjá Útvarpi Føroya tykist hinvegin at koyra nakað betur í løtuni.

– Tann loysnin, vit hava valt, riggar fyri í ár. Vit hava ásannað, at Sjónvarpið hevur ein bráðfengis tørv lønarhækkingum og øðrum, og hesum mugu vit fyrihalda okkum til, sigur Annlis Bjarkhamar.

## Meiri føroyskt tilfar

Stjórin fyri Sjónvarp Føroya, Mikkjal Helmsdal, sigur, at meirinntøkan til Sjónvarpið kom í tøkum tíma.

– Kom hendan hækkingin ikki, vórðu vit noydd at gera umfatandi uppsagnir í komandi ári, sigur Mikkjal Helmsdal, sum metir, at SvF við hækkingini fær luft, ið skal røkka til tey næstu 2-3 árini.

Hann metir, at SvF við hækkingini í hyggjaragjaldinum fer at fáa millum 4,5 og 5 milliónir afturat í kassan.

– Við verandi talið av gjaldarum vil hækkingin geva Sjónvarpinum 5,5 mió., men vit meta, at tað fer at gerast tyngri at fáa pengarnir inn við hesari hækkingini. Tískil hava vit mett eina meirinntøku upp á 4,5 til 5,0 milliónir, sigur Mikkjal Helmsdal.

Umleið 13.700 húski gjalda sum er sjónvarpsgjald.

Sum nevnt kemur peningurin á eitt turt stað hjá Sjónvarpi Føroya. Lønarhækkingar og rakstraríløgur fara avstað við størsta partinum av meirinntøkuni.

– Restin – so nógv sum gjørligt – fer til at framleiða meira føroyskt tilfar, sigur Mikkjal Helmsdal.

Hann sigur, at tey næstu árini fara vit at síggja meira føroyskt tilfar á skíggjanum í mun til seinnu árini.

Bera vit Sjónvarp Føroya saman við TV2 á Bornholm, so framleiðir SvF munandi meira fyri hvørja útreiðslu krónu, sigur sjónvarpsstjórin.

## Neyðugt við skoti

Bæði Annlis Bjarkhamar og Mikkjal Helmsdal eru samd um, at tað ikki er tann hepnasta loysnin, at Sjónvarp Føroya verður fíggjað beinleiðis á fíggjarlógini.

Bæði meta tey, at tað er týdningarmikið, at hildið verður eitt skot millum lóggevandi og játtandi myndugleikan og sjálvan fjølmiðilin.

Tað, at Sjónvarp Føroya kostar so mikið nógv, og áhugi ikki er fyri at játtað til raksturin á fíggjarlógin, ger, at skal meira peningur finnast, so má hyggjararin spýta í. Hesin sami hyggjarin, sum eisini betalur vanligan skatt, umframt hendan eyka skattin.

Sjónvarpsstjórin og landsstýrismaðurin eru somuleiðis samd í, at ein greið útmelding um, hvat myndugleikin vil við Sjónvarpi Føroya er neyðugur.

– Vilja vit hava eitt sjónvarp, so mugu vit eisini gjalda tað, ið tað kostar. Vit hava valt eina skipan við brúkaragjaldið, og tað mugu vit so halda okkum til.

Hinvegin er tað umráðandi, at vit fara at finnan útav, hvat við vilja við Sjónvarpi Føroya, sigur Annlis Bjarkhamar.

Hon heldur spurningin vera átrokandi í hesum døgum, tá útboðið av fylgisveinasjónvarpi gerst alsamt størri.

– Vit sakna eina greiða politiska útmelding um, hvat ynski er við stovninum, sigur Mikkjal Helmsdal.

Í januar og februar komandi ár fer Annlis Bjarkhamar aftur at hyggja nærri at Sjónvarpinum. Tá verður hugt bæði at fyrisitingarligum og fíggjarligum spurningum, millum annað frítøku fyri Mvg.

ítróttur

Nr. 234 • hósdagur • 5. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Svimjilandsliðið venur hart

**Fyri triðju ferð í ár var elitan á svimjilandsliðnum samlað til venjingarlegu um vikuskiftið. Eisini tríggir av útisetunum vóru komnir heim til venjingina**

SVIMJING
*Hilmar Jan Hansen*



*Eldru svimjararnir á landsliðnum avmyndaðir um vikuskiftið: Sára Ejdesgaard, Jóannes á Fløtti, Benthe Sikivat Andersen, Shaila Millum Garðarnar, Malan Michelsen, Lisbeth L. Joensen, Eivind Eysturoy, Dia Jacobsen, Asbjørn Hansen, Janus Olsen, Rannvá Jacobsen, Andrass Thomsen, Sonni Eliasen, Ingi Andreassen.*

Um vikuskiftið var elitan á svimjilandsliðnum, teir eldru svimjararnir, á venjingarlegu í Havn.

Umframt heimligu svimjararnar vóru eisini teir tríggir útisetarnir Asbjørn Hansen, Malan Michelsen og Sheila Millum Garðarnar komin heim til venjingarleguna, ið var tann triðja í ár.

Venjingarlegan endaði sunnukvøldið við einari elitukapping, tí har vóru bara fimtan teir bestu føroysku svimjararnir við.

Væl kom burturúr hjá flestu av svimjarunum, sum frammanundan skuldu havt klárað kravtíðir, ið landsliðsvenjarin hevði sett, og tvey bólkamet og heili fimm føroysk met vóru sett, tá kappingin var av.

Serliga gjørdi 20 ára gamla Benthe Sikivat Andersen vart við seg, tí hon setti sjálv met í bringusvimjing á bæði 50 og 100 metrum, umframt at hon saman við Maluni Michelsen, Shailu Millum Garðarnar og Lisbeth L. Joensen setti met í fýra ferðir 50 metra frísvimjing.

Asbjørn Hansen setti met í 50 metra bringusvimjing og Andrass Thomsen í 200 metra frísvimjing, og harumframt settu Sára Ejdesgaard og Janus Olsen bólkamet í ávikavist 50 metra ryggsvimjing og 50 metra firvaldssvimjing.

## Fleiri avbjóðingar

Umframt bólkamet og føroysk met, hava fleiri av svimjarunum klárað settu kravtíðirnar til oyggjaleikirnar á Guernsey komandi summar, so alt bendir á, at føroyski svimjihópurin verður væl betur mannaður enn í fjør, tá oyggjaleikir vóru á Man.

Sum er, hava Benthe Sikivat Andersen, Ingi Andreasen, Eivind Eysturoy, Shaila Millum Garðarnar, Asbjørn Hansen, Kristoffer Hentze, Dia Jacobsen, Malan Michelsen, Karina Petersen og Andrass Thomsen havt nóg góðar tíðir til at fáa pláss á liðnum, sum skal til oyggjaleikirnar, men fleiri kunnu koma aftrat.

Longu komandi vikuskiftið er aftur kapping, tá flestu av landsliðssvimjarunum hittast saman við øðrum í Klaksvík, har roknast kann við fleiri spennandi kappingum, tí svimjararnir eru sera javnir í fleiri greinum.

Ta fyrstu altjóða avbjóðingarnar fáa annars Sára Ejdesgaard, Janus Olsen og Lisbeth L. Joensen eisini um vikuskiftið, tá tey í Svøríki skulu kappast um norðurlandameistaraheitini hjá teimum yngru.

Annars verður aftur venjingarlega hjá svimjilandsliðnum í januar mánaði, tá svimjararnir eru boðsendir at møta í Klaksvík.



*Líkt er til, at føroysku svimjararnir verða væl mannaðir á oyggjaleikunum, sum verða á Guernsey næsta summar. Svimjararnir á myndini hava allir longu klárað kravtíðir, ið geva teimum kjansin at sleppa við. Aftast frá vinstru: Ingi Andreasen, Eivind Eysturoy, Asbjørn Hansen og Andrass Thomsen. Fremst frá vinstr: Dia Jacobsen, Benthe Sikivat Andersen, Shaila Millum Garðarnar og Malan Michelsen. Tveir svimjarar, Karina Petersen og Kristoffer Hentze, ið eisini hava klárað kravtíðirnar, vanta á myndini*